

## AaB í ovaru hálvu

Hetta kappingarárið byrjaði sera illa hjá danska meistaraliðnum AaB, men eftir venjaraskifti í heyst hevur gingið munandi betri. AaB lá í botninum, tá Allan Kuhn tók við sum venjari, og nú hann hevur havt ábyrgdina av liðnum í góðar tveir mánaðir, hevur AaB vunnið seg upp í ovaru hálvu av stigatalvuni. AaB vann um vikuskiftið 2-1 á Randers.

## Miðvallari bjargaði brotssparki

Jan Rosenthal, sum spælir á miðvøllinum hjá týska felagnum Hannover, endaði sum málmaður í dystinum ímóti Wolfsburg um vikuskiftið. 10 minuttir vóru eftir at spæla, tá málmaðurin hjá Hannover varð vístur út, og eingin útskifting var eftir. Rosenthal fór í málið, og tað fyrsta , hann gjørdi, var at bjarga einum brotssparki frá Wolfsburg.  Tá var støðan 2-1 til Wolfsburg, og tað gjørdist eisini úrslitið.

# Noreg aftur tryggan sigur

**Noreg tekur trý stig við sær til høvuðsumfarið, har Danmark er fyrsta landið, sum bíðar týskvøldið**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Noreg vann ein tryggan 34-19 sigur á Portugal, og vunnu tær norsku sostatt innleiðandi bólkin. Men tey iðra seg yviri í Noregi, at Breivik og genturnar ikki fingu fulla undirtøku ímóti Spania, tí Noreg byrjar høvuðsumfarið við 3 stigum, meðan Rumenia hevur 4 stig frá sínum innleiðandi bólki. Norski venjarin, Marit Breivik gleðir seg til Høvuðsumfarið: - Nú hava vit verið ígjøgnum upphitingina, og nú byrjar tað av álvara.

### Stýrdu frá byrjan av

Tær norsku løgdu hart út ímóti Portugal, og longu tá 20 minuttir vóru farnir, varð støðan 12-3 til Noreg. Tá byrjaði Portugal at koma seg, og vunnu tær nakað inn á norsku leiðsluna, men aftaná, at Marit Breivik hevði tikið timeout vunnu tær norsku seg uppá 16-9, sum gjørdist hálvleiksstøðan. Tær norsku stýrdu eisini 2. Hálvleiki, men nýtti Marit Breivik høvið til at venja genturnar at spæla álopsspæl, og tí legði hon ”forboð” ímóti kontrarenningum í 2. Hálvleiki. Kari Aalvik Grimsbø í norska málinum fekk eina breiðsíðu frá venjaranum, tá setti eitt kontraálop í gongd. Toppskjúttin hjá Noregi, Linn-Kristin Riegelhuth, sum skeyt 9 mál segði aftaná dystin, at tað kendist løgið, at skula spæla so bundið í ein heilan hálvleik. Men heldur Riegelhuth, at júst hendan royndin kann fara at vísa seg at verða gull verd, tá Noreg skal upp ímóti sterkari mótstøðuliðum. Týskvøldið stendur Danmark á skránni.

**Støðan í bólkaspælinum**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur A** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Rumenia | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 84 | 71 | 13 | 6 |
| 2 | Danmark | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 75 | 76 | -1 | 3 |
| 3 | Ungarn | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 76 | 79 | -3 | 3 |
| 4 | Frakland | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 74 | 83 | -9 | 0 |
| **Bólkur B** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Noreg | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 88 | 60 | 28 | 5 |
| 2 | Spania | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 74 | 69 | 5 | 4 |
| 3 | Ukraina | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 82 | 81 | 1 | 3 |
| 4 | Portugal | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 101 | -34 | 0 |
| **Bólkur C** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Russland | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 79 | 66 | 13 | 5 |
| 2 | Svøríki | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 64 | 50 | 14 | 4 |
| 3 | Hvítarussland | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 77 | 71 | 6 | 3 |
| 4 | Eysturríki | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 53 | 86 | -33 | 0 |
| **Bólkur D** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Týskland | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 89 | 80 | 9 | 6 |
| 2 | Makedonia | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 84 | 84 | 0 | 4 |
| 3 | Kroatia | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 86 | 89 | -3 | 2 |
| 4 | Serbia | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 87 | 93 | -6 | 0 |

**Høvuðsumfarið**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur I** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Rumenia | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 54 | 46 | 8 | 4 |
| 2 | Noreg | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 54 | 41 | 13 | 3 |
| 3 | Spania | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 45 | 45 | 0 | 2 |
| 4 | Danmark | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 51 | 53 | -2 | 1 |
| 5 | Ungarn | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 47 | 53 | -6 | 1 |
| 6 | Ukraina | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 44 | 57 | -13 | 1 |
| **Bólkur II** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Týskland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 57 | 49 | 8 | 4 |
| 2 | Russland | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 48 | 44 | 4 | 3 |
| 3 | Svøríki | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 40 | 40 | 0 | 2 |
| 4 | Makadonia | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 53 | 54 | -1 | 2 |
| 5 | Hvítarussland | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 46 | 50 | -4 | 1 |
| 6 | Kroatia | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 56 | 63 | -7 | 0 |

# Kári skal venja MB

**Miðvágs Bóltfelag hevur gjrøt av, at Kári Reynheim verður nýggjur venjari hjá besta mansliðnum hjá felagnum.**

**MB skal komandi ár spæla í 1. deild, og verður tað undir leiðslu av Kára Reynheim, sum hartil eisini hevur Per Joensen afturat sær.**

**Kári Reynheim, sum í drúgt áramál taldist millum bestu føroysku spælararnar, er 44 ára gamal. Hann hevur tikið venjaraútbúgving í Noreg, har hann virkaði sum venjari í 1999. Her heima hevur hann verið venjari hjá B71, Fram og SÍ, umframt at hann eisini hevur virkað sum ungdómsvenjari.**

**-mørk**



*Kári Reynheim spældi 27 skrásettar A-landsdystir fyri Føroyar, og skoraði hann 2 mál í hesum*

